# Ferguson fylgir Juventus

Venjarin hjá Manchester United, Sir Alex Ferguson, váttar nú alment, at hann er áhugaður í fleiri av spælarunum, sum italska felagið Juventus kann verða noytt at selja orska av niðurflytingini til næstbestu deildina.

- Vit hava fylgt støðuni og bíða, til vit vistu, hvat hetta fór at enda við. Nú fara vit kanska at bjóða upp á ein ella tveir spælarar, sigur Alex Ferguson við BBC.

Sambært rásini er United-venjarin áhugaður í Buffon, Zambrotta, Cannavaro, Thuram, Emerson og Vieira.

Fleiri av teimum kunnu verða seldir fyri lítið lætt, um teir verða seldir til eitt felag uttanfyri Italia.



*(Mynd: Ferguson)*

# Ullrich vil síggja prógv

Týski súkklarin Jan Ullrich vil síggja prógv fyri, at hann hevur dopað seg. Tað sigur hann á heimasíðu sínari, eftir at hann hevur verið í andglettinum seinastu dagarnar orsaka av søgum um doping. Ullrich er ein av skúkklarunum, sum eru blandaðir upp í eina dopinggølu í Spania, og hann sleppur tí ikki at verða við í Tour de France í ár.

- Advokatar hjá mær hava biðið spaniónlar um at koma við ítøkiligum prógvum ímóti mær, sigur Jan Ullrich.

- Í einum rættarsamfelag ert tú ósekur, til nakað annað er pógvað, sigur hann.

# Jarnbardur tevjar gull

**Men tað skal vita Riddaranum verri við, enn tað hevur gjørt higartil, um tað ikki skal eydnast teimum úr Miðvági at vinna FM heitið fyri nøsini á Jarnbardi**

**6-MANNAFØR KVINNUR**

*Jóannes Hansen*

Ein eitt sindur margháttlig støða hevur myndað seg. Jarnbardur, sum luttók á Norðoyastevnu til stuttleika, sum manningin sjálv lýsir tað, er nú rættuliga við at blanda seg í kappingina um gullkrónurnar og FM ferðasteypið, sum tær hava vunnið tvey tey seinastu árini og harvið hava møguleika at vinna til ognar, um alt á Ólavsøku fer at ganga teimum til vildar.

Fyrsta treytin fyri, at Jarnbardur skal vinna FM, er, at Jarnbardur verður fyrstur á mál ólavsøkuaftan. Tann setningurin tykist ikki vera so torførur at røkka hjá Jarnbardi. Hóast tær leingi ikki vóru so væl við í Sandavági, so eydnaðist teimum kortini at vinna triðja sigurin á rað.

- Vit fingu ikki góðan start. Á fyrsta teininum mistu vit eitt sindur til Riddaran. Hetta stríddust vit allan teinin við at vinna inn aftur, og tað var fantastiskt, at tað eydnaðist í síðstu tøkunum at taka Riddaran, frøddist stýrimaðurin á Jarnbardi, Jannie Dam Jacobsen, saman við bátsfeløgunum, eftir at tað var vorðið teimum greitt, at tær í síðstu løtu høvdu vunnið tepran sigur.

Spurningurin er so, um tað fer at eydnast Jarnbardi at vinna FM. Um tað skal eydnast, so skal Riddarin ikki vinna seg longri fram enn á triðja plássið. Higartil hevur Riddarin hvørja ferð verið fremstur ella næstfremstur.

Á Vestanstevnu róði Riddarin væl. Hann var leingi fremstur, og tá ið Jarnbardur fyrstu ferð bjóðaði av, megnaði Riddarin at halda tørn. Hóast hann í seinastu tøkunum misti sigurin, so vóru tað leygardagin ongar ábendingar um, at Riddarin á Ólavsøku ikki skal megna at vinna í hvussu so er næstfremsta plássið.

Riddarin var sjey sekund ella væl meiri enn tvær bátslongdir fyrr á mál enn Lómur av Argjum, sum var í tættari kapping við Hvessing um triðja plássið, meðan Smyril var væl aftastur.

**Úrslit - 6 mannafør kvinnur**

1 Jarnbardur 04:57.24
2 Riddarin 04:58.12
3 Lómur 05:05.11
4 Hvessingur 05:06.11
5 Smyril 05:14.16



*Jarnbarndur hevur veruliga blandað seg upp í kappingina hjá 6-mannaførum við kvinnum.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Cecil Weihe vann Tórshavn Marathon fyri fjórðu ferð á rað.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Cecil vann aftur

**Cecil Weihe vann í gjár Tórshavn Marathon fyri fjórðu ferð á rað. Cecil fylgdist við fleiri øðrum rennarum á langa teininum, men fram móti endanum dró hann frá øllum**

**MARATHON**

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Sunnudagin var Tórshavn Marathon hildið fyri fjórðu ferð, og fyri fjórðu ferð gjørdist tað Cecil Weihe, sum vann høvuskappingina – marathonrenningina.

Cecil Weihe fylgdist við fleiri øðrum føroyskum rennarum á langa teinum úr og til høvuðsstaðin, men tá ið málið nærkaðist dró hann frá Borgar Biskopstø og hinum rennarunum, og hann rann einsamallur seinasta teinin á málið.

Cecil Weihe kom undir teir tríggjar tímarnar, tí hann rann í tíðini 2.53,03.

Veðrið var ikki av tí besta til eina rennikapping sunnudagin. Serliga tá ið rennararnir fóru av málinum var vátt og ruskut, men veðrið batnaði út á seinnapartin, og tá gjørdist heldur frægari at renna. Tíðirnar í kappingini vóru tó merktar av, at veðrið var vánaligt.

Hjá kvinnum vann Rigmir Napoelonsdóttir Arge marathonkappingina. Hon brúkti 3.16,21 um teiin.

Kappast var eisini í fleiri øðrum styttri teinum.

## Tórshavn Marathon úrslit

| | | |
|---|---|---|
| **Dreingir 3 km** | | |
| 1. Rúni Seloy | Bragdið | 11,46 |
| 2. Regin Joensen | Frældi | 12,51 |
| 3. Árni Johanesson | Argir | 12,54 |
| **Gentur 3 km** | | |
| 1. Kristín Lív Svabo Jónsdóttir | ÍR | 14,22 |
| 2. Bjørk Reynagarð Svabo | Frælsi | 15,35 |
| 3. Edna Maria Debes | Bragdið | 17,22 |
| **Kvinnur 5,8 km** | | |
| 1. Bjørk Herup Olsen | Bragdið | 24,10 |
| 2. Katrin Olsen | Knørrur | 25,42 |
| 3. Rannvá Djurholm | Bragdið | 25,49 |
| **Menn 5,8 km** | | |
| 1. Jóan Karl Joensen | Bragdið | 20,54 |
| 2. Álvur F. Christiansen | Treysti | 22,05 |
| 3. Jan Elmar Sørensen | Treysti | 22,27 |
| **Kvinnur hálvmarathon** | | |
| 1. Hanne Maria Yri | Danmark | 1.42,42 |
| 2. Lene Hultberg | Føroyar | 1.52,37 |
| 3. Marin í Dali | Hvistan | 1.54,46 |
| **Menn hálvmarathon** | | |
| 1. Karl Simpson | Shetland AAC | 2.22,24 |
| 2. Guttorm Sørensen | Treysti | 1.27,57 |
| 3. Ólavur Kjølbro | Føroyar | 1.32,03 |
| **Kvinnur marathon** | | |
| 1. Rigmor N. Arge | Bragdið | 3.16,21 |
| 2. Frances Ridgway | Fairlands Valley | 3.58,73 |
| 3. Britta Houmann | Odder Atletik & Motion | 4.01,15 |
| **Menn marathon** | | |
| 1. Cecil Wiehe | Bragdið | 2.53,03 |
| 2. Borgar Biskopstø | Treysti | 2.58,02 |
| 3. Sigurð Justinussen | Bragdið | 3.03,29 |